FJØLRIT

- tryggjar burðardyggu listaringrásina

# Ársfrágreiðing · FEB 2023




Faldari um Fjølrit, ið Helle Thede Johansen hevur gjørt

# FJØLRIT

## - tryggjar burðardyggu listaringrásina

Fjølrit er meginfelag hjá feløgum, sum umboða rættindahavar, tá ið verk, vard av lógini um upphavsrætt, verða nýtt.
Brúk merkir øll endurgeving - ljósriting, avriting, fjølriting, talgilding og onnur margfalding av vardum verkum, tað veri seg við framførslu, útgávu ella framleiðslu, sama hvar, hvussu ella í hvørjum sniðið verkið er skapt ella er til taks.
Peningurin, sum Fjølrit fær inn, fer útaftur til rættindahavarar, sum eiga verkini. Fjølrit leggur dent á, at nýtt mentanarligt tilfar verður skapað í Føroyum. Hetta nevna vit eina mentanarliga ringrás, ið fær høvundar og listafólk annars at menna føroysku mentanina.

Fjølrit hevur sum felagskapur onki sjálvstøðugt fíggjarligt endamál.

**Limafeløg**
Hesi feløg eru limir í Fjølriti, og tað eru hesar listagreinar, Fjølrit umboðar:

- Rithøvundafelag Føroya
- Føroysk tónaskøld
- Føroysk myndlistafólk
- Føroyskir yrkisfotografar
- Føroysk bókaforløg
- Føroya miðlafólk

**Umboðsráðið**
Hvørt limafelag tilnevnir eitt umboð og eitt varaumboð í umboðsráðið.

Umboðsráðið skal:

- gera av, hvussu Fjølrit skal virka
- velja stjórnina
- hava eftirlit við arbeiði stjórnarinnar
- eftir uppskot frá stjórnin gera reglugerð um handfaring av viðurløgum

**Lóg um upphavsrætt**
Fjølrit hevur loyvi frá Mentamálaráðnum at virka sum rættindafelagskapur, í samsvari við § 40, stk 1 í løgtingslóg um upphavsrætt.

**Stjórnin og daglig umsiting**
Stjórnin er mannað soleiðis:

- Helle Thede Johansen, forfólk
- Niels Jákup Thomsen, skrivari
- Steintór Rasmussen, stjórnarlimur

Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð, aðalskrivari, og Símun Petur Venned, KT-mennari, taka sær av dagligu umsitingini.
Jónas Tór Næs er knýttur at Fjølriti sum løgfrøðiligur ráðgevi.
Jákup Samuelsen er bókhaldari.
Samband fæst við at senda teldupost til post@fjoelrit.fo ella ringja 23 86 00 ella 23 86 01.

# Ársfrágreiðing

## til aðalfundin hjá Fjølriti 21. februar 2023

Árið 2022 var eitt hendingaríkt ár fyri Fjølrit. Umsitingarliga fóru stórar broytingar fram, samstundis sum dagliga virksemið rættiliga tók dik á seg aftur, eftir eitt tíðarskeið við nógvum avmarkingum, ið stóðust av koronu. Avtalurnar, sum Fjølrit hevur gjørt síðan 2018 um brúk av vardum tilfari, virkaðu allar til fulnar, og arbeitt varð við at kanna møguleikar fyri at gera fleiri avtalur fyri øki, sum enn ikki eru fevnd av nakrari avtalu, eitt nú kirkjur og samkomur.

**Broytingar í umsitingini í 2022**
Heidi Durhuus, sum hevur verið umsitari og KT-mennari hjá Fjølrit síðan 1. apríl 2018, fór við ársbyrjan niður í hálva tíð, og í desember segði hon seg úr starvi fyri at byrja í nýggjum starvi í Bergen, har hon og familjan býr. Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð varð frá 1. mars 2022 settur í tíðaravmarkað starv hálva tíð sum umsitari, og frá 1. juli 2022 varð setanin longd til 31. mars 2023, samstundis sum starvsheitið varð broytt til aðalskrivari. Í oktober varð lýst eftir nýggjum KT-mennara, og 1. desember 2022 byrjaði Símun Petur Venned í starvi fulla tíð sum KT-mennari.

Broytingar vóru eisini í stjórnini. Høgni Reistrup, sum var formaður frá 2021-22, fór í juli 2022 úr stjórnini, og Steintór Rasmussen, varamaður, tók við frá 1. august 2022. Stjórnin skipaði seg nú við Helle Thede Johansen sum forfólki.

**Avtalur**
Avtala varð undirskrivað við Hvannasunds kommunu um at nýta vard verk í kommununi. Við hesum hevur Fjølrit avtalu við allar 28 kommunurnar í landinum.

Eingin onnur ítøkilig avtala um at nýta vard verk bleiv undirskrivað farna árið, men tað eru væntandi nakrar avtalur á veg.

Fleiri fundir hava verið við felagið SamRit, sum umboðar kirkjur og samkomur. SamRit hevur ført fram ynski um almenna talgilda atgongd til allar sálmar, men Fjølrit hevur gjørt greitt, at felagið eftir galdandi lóg hevur ikki heimild til at gera slíka avtalu. Tað verður helst neyðugt við einari lógarbroyting, sum veitir Fjølrit neyðugu heimildina, áðrenn hesar samráðingarnar kunnu bera á mál.

Fjølrit hevur verið hoyringarpartur í sambandi við, at uppskot um nýggja bókasavnslóg skal leggjast fyri løgtingið. Tað er serliga bókasavns-gjaldið, sum hevur áhuga, sæð frá einum upphavsrættarligum sjónarhorni. Fjølrit hevur gjørt vart við, at felagið sær bókasavnsgjaldið sum viðurlag fyri upphavsrætt, og at hetta eitt nú hevur við sær nakrar løgfrøðiligar avleiðingar, sum hædd eigur at verða tikin fyri í lógarupp-skotinum. Samstundis hevur Fjølrit mótmælt einari ætlan um at rokna bókasavnsgjald sum mentanarstuðul. Eitt annað mál av áhuga fyri Fjølrit, eru ásetingarnar í nýggju lógini, sum heimila bókasavnsmyndugleikanum at framleiða og lána út ljóðbøkur og talgilt tilfar um netið til fólk við lesitarni. Her gjørdi Fjølrit millum annað vart við, at hóast heimild er í lóg til at framleiða ljóðbøkur til fólk við lesitarni, so eigur forlagið, sum hevur givið út bókina, rætt til viðurlag. Av tí at løgtingsval bleiv útskrivað, varð hetta lógararbeiðið nakað seinkað, men uppskotið um nýggja bókasavnslóg verður eftir ætlan lagt fyri løgtingið tíðliga í 2023.

**Innkomin peningur**
Avtalan við Uttanríkis- og mentamálaráðið fevndi í 2022 um teir somu 10 stovnarnar sambært fíggjarlógini, og allar rokningarnar vórðu rindaðar stundisliga. Inn komu kr. 900.987,80. Hetta er ein lækking í mun til árið fyri, sum stendst av, at Fróðskaparsetur Føroya í 2021 sendi Fjølrit skeiv tøl fyri lestrarársverk, sum gjørdi, at Setrið rindaði ov nógv í 2021. Avtalað varð tí gjørd í august í 2022, at ov nógv goldna upphæddin skuldi mótroknast í rokningini fyri 2022.

Rokningar vóru sendar teimum 27 kommun-unum, við avtalu fyri skúlaárið 2021/22 á kr. 1.436.800,00. Talan er um 7184 fólkaskúla-næmingar á kr. 200. Allar rokningarnar uttan ein eru avgreiddar.

# FJØLRIT

Uppgerð frá Kringvarpinum verður latin ársfjórðingin afturút, og inngjaldingarnar í 2022 fevna sostatt um 4. ársfjórðing 2021 og 1., 2. og 3. ársfjórðing í 2022. Inn komu kr. 268.702,61.

| | Mentamálaráðið | kommunurnar | Kringvarpið | Barnabati |
|---|---|---|---|---|
| 2014 | 200.000 | | | |
| 2015 | 200.000 | | | |
| 2016 | 200.000 | | | |
| 2017 | 133.333 | | | |
| 2018 | 1.026.856,95 | | 412.220 | |
| 2019 | 954.258,45 | 1.321.000 | 258.892,44 | |
| 2020 | 971.695,55 | 1.373.600 | 441.668,33 | 325 |
| 2021 | 1.063.425,7 | 1.396.200 | 414.093,63 | 150 |
| 2022 | 900.987,80 | 1.436.800 | 268.702,61 | 0 |

*KVF 2019 er fyri 3 ársfjórðingar

**Skrásettir rættindahavarar**
Í 2022 skrásettu 25 nýggir rættindahavarar seg hjá Fjølriti. Sostatt eru nú tilsamans 234 skrásettir rættindahavarar. Av hesum eru 18 feløg. Allir skrásettu rættindahavararnir eru føddir fyri ár 2000.

**Útgjald**
Eftir avtaluni við Kringvarp Føroya vórðu í 2022 settar av kr. 244.271,49 til útgjald. Av hesum vórðu kr. 198.849,31 goldnar út eftir skrásettari nýtslu til 34 rættindahavarar. Goldið verður út fýra ferðir árliga, og tá rættindahavari skrásetur seg.

Eftir avtaluni við kommunurnar vórðu í 2022 settar av kr. 1.011.587,50 til útgjald, fyri nýtslu í skúlaárinum 19/20. Ein lítil triðingur varð settur av til útlendskar rættindahavarar, meðan kr. 710.598,34 vórðu settar av til føroyskar rættindahavarar. Av hesum vórðu kr. 586.741,01 goldnar út eftir fráboðan til 91 fráboðanir, svarandi til kr. 6.309,04 fyri hvørja fráboðan. Restin, kr. 123.857,29, ella 17,43%, vórðu settar av til individuelt útgjald sambært nýtslukanning, sum varð gjørd í fólkaskúlunum í 2021, og av hesum vórðu í 2022 kr. 9.451,27 goldnar út til 4 rættindahavarar.

Eftir avtaluni við Mentamálaráðið vórðu í 2022 kr. 715.605,03 settar av til útgjald, fyri nýtslu í skúlaárinum 19/20. Gott og væl helvtin vórðu settar av til útlendskar rættindahavarar, meðan kr. 310.099,14 vórðu settar av til føroyskar rættindahavarar. Av hesum vórðu kr. 155.049,57 goldnar út eftir fráboðan til 101 fráboðanir, svarandi til kr. 1.535,14 fyri hvørja fráboðan. Restin, kr. 155.049,57, vórðu settar av til individuelt útgjald sambært undirvísingarætlanum frá miðnámi og skrásetingum frá Próvstovuni, og av teimum vórðu í 2022 goldnar út kr. 64.312,78 til 66 rættindahavarar.

Sambært lóg um upphavsrætt § 43, fyrnar viðurlag fyri nýtslu av vardum verkum 3 ár frá ársenda av tí árinum, tá ið verkið varð nýtt. Ger rættindahavari ikki vart við seg innan hesa freist, ger Fjølrit sum góðkendur felagsskpur av, hvussu hesi viðurløg skulu nýtast. 31. desember 2021 fyrndust kr. 442.000,00, sum hava staðið avsettar til rættindahavarar fyri nýtslu fyri 31. desember 2018.

**Tiltøk**
Korona var í 2022 ikki longur nøkur forðan fyri at hava tiltøk og fundir, og tí luttók Fjølrit aftur á fleiri tiltøkum, bæði uttanlands og í Føroyum, eins og áðrenn korona.

Árligi Norðurlendski stórfundurin, tá allir rættindahavarafelagsskapir í Norðurlondum hittast, varð hildin í Reykjavík frá 4.-6. mai

# FJØLRIT

2022. Stjórnarlimirnir og aðalskrivarin hjá Fjølrit luttóku.

Árliga ráðstevnan hjá europeisku deildini í altjóða upphavsrættarsambandinum IFRRO varð hildin í Oslo dagarnar 24.-25. mai 2022. Tað lá tíverri ikki fyri hjá nøkrum í Fjølrit at taka lut á hesum fundinum.

Árligi Norðurlendski statistikkfundurin, tá KT-fólk, løgfrøðingar og onnur starvsfólk hjá rættinda-havarafelagsskapum í Norðurlondum hittast, varð hildin í Oslo frá 2.-3. juni 2022. KT-mennarin hjá Fjølrit tók lut á fundinum.

Umboðsráðsfundur varð hildin 26. september 2022, har broytingar í umsitingini hjá Fjølrit vórðu viðgjørdar, og har feløgini eisini vórðu kunnað um virksemið og ætlanir fram til aðalfundin í 2023.

Ársfundur og -ráðstevna hjá altjóða upphavs-rættarsambandinum IFRRO varð hildin í Brússell frá 24.-27. oktober 2022. Eftir ætlan skuldu ein stjórnarlimur og aðalskrivarin taka lut, men stjórnarlimurin fekk forfall, so aðalskrivarin luttók einsamallur.

Árligu læraradagarnir í Norðurlandahúsinum, sum Nám skipar fyri, vóru aftur á skrá dagarnar 8.-10. november 2022. Fjølrit hevði ein bás, og aðalskrivarin mannaði básin allar dagarnar.

Árligu bókadagarnir vórðu hildnir í Norðurlanda-húsinum frá 16.-20. november 2022. Fjølrit luttók við einum bási dagarnar 18.-20. november, og stjórnarlimir og aðalskrivarin skiftust um at manna básin.

**Talgildisbúgving - FjølNám**
Vegna broytingarnar í umsitingini hjá Fjølrit í 2022, lá verkætlanin við lærupallinum FjølNám í dvala alt árið. Ætlanin er at taka upp aftur samstarvið við Nám í 2023, soleiðis at lærupallurin verður klárur seinni í 2023.

**Ætlanir í 2023**
Avtalan við kommunurnar gekk út 1. august í 2022, og tí verður arbeitt við at endurskoða og endurnýggja avtaluna, so at ein nýggj avtala kemur í gildi í 2023. Fjølrit hevur sett fram ynski um: 1) at taka burtur ásetingina um, at avtalan gongur út ein ávísan dag, 2) at undirskriva eina einstaka avtalu við Kommunufelagið vegna allar kommunurnar heldur enn 28 avtalur, 3) at



**Nýggjur KT-mennari**
Símun Petur Venned (vm) tók í desember 2022 við starvinum sum KT-mennari hjá Fjølrit, eftir Heidi Durhuus (hm), sum 1. apríl 2018 varð sett í starv sum fyrsta lønta starvsfólkið í Fjølriti nakrantíð. (Foto: Helle Thede Johansen)

# FJØLRIT

dagføra upphæddina á viðurlagnum, 4) at fáa greiðari mannagongdir fyri, hvør rindar fyri næmingar, sum ganga í skúlum í grannakommunum, og 5) at kanna, um onnur nýtsla kann verða umfatað av avtaluni.

Ætlanin er eisini at endurskoða og dagføra avtaluna við Kringvarp Føroya.

Arbeitt verður víðari við at gera eina avtalu um nýtslu av tilfari í kirkjum og samkomum í Føroyum. Eisini verður hugt eftir møguleikum at gera avtalur innan onnur øki, sum ikki eru fevnd av verandi avtalum, eitt nú almenna fyrisitingin, bókasøvn, skeiðsdeplar og onnur.

Ætlanin er at leggja størri orku í at kunna um Fjølrit og virksemið hjá felagnum, bæði mótvegis teimum, sum eru partur av avtalunum, so sum skúlum og lærarum, og mótvegis teimum rættindahavarum, sum ikki hava skrásett seg, men eiga viðurlag til góða, og teimum rættindahavarum, sum hava rætt til at fáa viðurlag goldið út eftir fráboðan, men ikki vita av tí, ella ikki vita, hvussu teir skulu gera.

Eftir ætlan fara stjórn og starvsfólk aftur í 2023 at taka lut á viðkomandi fundum og ráðstevnum í Føroyum og uttanlands. Tað er mennandi at skifta orð og hoyra um tær royndir, hini feløgini hava gjørt sær, og vit hava øll gagn av at deila okkara vitan. Norðurlendskur stórfundur verður í Helsinki í juni, statistikkfundur verður í Keypmannahavn í mai, og IFRRO-fundirnir verða í Stockholm í mai og í Reykjavík í oktober. Eisini er ætlanin at luttaka aftur á bæði læraradøgunum og bókadøgunum í 2023.

Orka fer eisini at verða løgd í støðugt at menna og einfalda skipanir og mannagongdir, so at tað verður so smidligt og einfalt sum til ber fyri bæði brúkarar og rættindahavarar at umsita avtalur og viðurløg.

# Grannskoðan

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

## Fjølrit

Postsmoga, 62, 110 Tórshavn

## Ársfrásøgn

## 2022

FRUMRIT

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á felagsins ársaðalfundi, tann 21. februar 2023.

Ove Wich

Fundarstjóri

## Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Leiðslufrágreiðing** | |
| Upplýsingar um felagið | 5 |
| Leiðslufrágreiðing | 6 |
| **Ársroknskapur 1. januar - 31. december 2022** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 7 |
| Rakstrarroknskapur | 9 |
| Fíggjarstøða | 10 |
| Notur | 11 |

## Leiðsluátekning

Stjórnin hevur í dag lagt fram ársfrásøgnina fyri 2022 hjá Fjølrit.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. december 2022 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. december 2022.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, tann 21. februar 2023

**Stjórn**

| | | |
|---|---|---|
| Helle Thede Johansen<br>forkvinna | Niels Jákup Thomsen<br>skrivari | Steintór Rasmussen<br>stjórnarlimur |

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Til leiðsluna í Fjølrit**

**Niðurstøða**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Fjølrit fyri roknskaparárið 1. januar - 31. december 2022 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. december 2022 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum í roknskaparárinum 1. januar - 31. december 2022 samsvarandi ársroknskaparlógini.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða reglunum hjá International Ethics Standards Board for Accountants' um etiskan atburð hjá grannskoðarum (IESBA Code) og øðrum etiskum krøvum, sum eru galdandi í Føroyum. Vit hava eisini hildið hinar etisku skyldurnar, sum ásettar eru í hesum krøvum og IESBA Code. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

**Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin**

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar.

- Gera niðurstøðu um, hvørt tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Meta um samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, herundir upplýsingarnar í notunum, umframt um ársroknskapurin vísir tey undirliggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd av hesum.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva onga váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

Í sambandi við okkara grannskoðan av ársroknskapinum er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi at umhugsa um leiðslufrágreiðingin er í týðandi ósamsvari við ársroknskapin ella ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt tykist at hava týðandi skeivleikar.

Okkara ábyrgd er eisini at umhugsa um kravdu upplýsingarnar eftir ársroknskaparlógini eru umrøddar í leiðslufrágreiðingini.

Við støði í gjørda arbeiðinum er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við ársroknskapin, og at hon er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi skeivleikar í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, tann 21. februar 2023

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

John Michal Petersen
statsaut. revisor

## Upplýsingar um felagið

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið** | Fjølrit<br>Postsmoga 62<br>110 Tórshavn | |
| | Heimasíða: | www.fjoelrit.fo |
| | V-tal: | 429198 |
| | Roknskaparár: | 1. januar - 31. december |
| **Stjórn** | Helle Thede Johansen, forkvinna<br>Niels Jákup Thomsen, skrivari<br>Steintór Rasmussen, stjórnarlimur | |
| **Grannskoðan** | **P/F Januar, løggilt grannskoðanarvirki**<br>Óðinshædd 13, Postbox 30, FO-110 Tórshavn<br>Telefon: 31 47 00 - Telefaks: 35 17 01<br>Teldupostur: januar@januar.fo<br>Heimasíða: www.januar.fo | |

## Leiðslufrágreiðing

**Virksemi**

Virksemið hjá Fjølriti er at útvega upplýsingar og mæla til tiltøk til frama fyri áhugamálini hjá rættindaeigarunum. At samskipa krøvini hjá limafeløgunum, samráðast og gera sáttmálar teirra vegna, at umsita og býta samsýningar og endurgjøld fyri at brúka upphavsrættarliga vard verk. At veita feløgum hjá útlendskum rættindaeigarum og móttaka frá teimum samsýningar og endurgjøld.

Fjølrit er góðkendur felagsskapur sambært § 40, stk. 1 í løgtingslóg nr. 30 fra 30. apríl 2015 um upphavsrætt (hereftir nevnd upphavsrættarlógin) og umboðar rættindahavarar í sambandi við øll sløg av endurgeving, ljósriting, avriting, fjølriting ella onnur margfalding av vardum verkum, tað veri seg í framførslu, útgávu ella framleiðslu, sama hvar, hvussu ella í hvørjum sniði verkið er/verður skapt ella er til taks.

Í løtuni eru hesi feløgini limir í Fjølrit: Rithøvundafelag Føroya, Felagið Føroysk Tónaskøld, Føroyskir Yrkisfotografar, Føroysk Bókaforløg, Føroysk Miðlafólk og Føroysk Myndlistafólk. Í avtaluhøpi umboðar Fjølrit allar rættindahavarar innan hesi øki.

Fjølrit hevur sum felagsskapur einki fíggjarligt endamál.

## Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin fyri Fjølrit er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri feløg í flokki B.

Ársfrásøgnin er gjørd eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár og verður gjørd í donskum krónum (DKK).

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanberingartøl undanfarna ár verða avrundað til heil túsund. Av tí, at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

### Rakstrarroknskapurin

**Nettoinntøka**
Nettoinntøka umfatar viðurløg fyri nýtslu av upphavsrættarliga vardum verkum.

**Útgoldin viðurløg**
Útgoldin viðurløg umfatar útgoldin viðurløg til rættindahavara at verkunum.

**Aðrir uttanhýsis kostnaðir**
Aðrir uttanhýsis kostnaðir umfata kostnaðir til sølu, marknaðarføring, fyrisiting, hølir og tap av áognarum.

**Starvsfólkakostnaðir**
Starvsfólkakostnaðir umfata løn, íroknað frítíðarløn og eftirløn, umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum vera móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

**Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir**
Fíggjarligir postar umfata rentur. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

### Fíggjarstøðan

**Áogn**
Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

**Tíðaravmarkingar**
Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, umfata útgjøld, sum viðvíkja kostnaðum komandi roknskaparári.

**Tøkur peningur**
Tøkur peningur umfatar innistandandi í peningastovnum og reiðan pening.

## Nýttur roknskaparháttur

**Skuld**

Onnur skuld verður tikin við til amortiseraða útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

## Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. december

| Nota | | 2022<br>kr. | 2021<br>t.kr. |
|---|---|---|---|
| | Nettoinntøka | 2.606.491 | 2.874 |
| | Útgoldin viðurløg | -1.008.656 | -1.533 |
| | Aðrir uttanhýsis kostnaðir | -209.989 | -115 |
| | **Bruttoúrslit** | **1.387.846** | **1.226** |
| 1 | Starvsfólkakostnaðir | -675.585 | -576 |
| 2 | Aðrir fíggjarligir kostnaðir | -25.802 | -32 |
| | **Ársúrslit** | **686.459** | **618** |

| | 2022 | 2021 |
|---|---|---|
| **Uppskot til býti av úrsliti:** | | |
| Flytast til flutt úrslit | 686.459 | 618 |
| **Býtt tilsamans** | **686.459** | **618** |

## Fíggjarstøða 31. december

**OGN**

| Nota | | 2022 kr. | 2021 t.kr. |
|---|---|---|---|
| | **Ogn í umferð** | | |
| 3 | Áogn | 11.000 | 6 |
| | Tíðaravmarkingar | 0 | 44 |
| | Áogn tilsamans | 11.000 | 50 |
| | Tøkur peningur | 5.696.781 | 5.002 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **5.707.781** | **5.052** |
| | **OGN TILSAMANS** | **5.707.781** | **5.052** |

**SKYLDUR**

| Nota | | 2022 kr. | 2021 t.kr. |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| 4 | Flutt úrslit | 5.698.315 | 5.036 |
| | **Eginogn tilsamans** | **5.698.315** | **5.036** |
| | **Skuld** | | |
| | Onnur skuld | 9.466 | 16 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 9.466 | 16 |
| | **Skuld tilsamans** | **9.466** | **16** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **5.707.781** | **5.052** |

## Notur

| | | 2022 kr. | 2021 t.kr. |
|---|---|---|---|
| **1.** | **Starvsfólkakostnaðir** | | |
| | Lønir | 607.215 | 545 |
| | Eftirlønir | 41.228 | 3 |
| | Onnur almenn gjøld | 27.142 | 28 |
| | | **675.585** | **576** |
| | Nevnd | 28.380 | 18 |
| **2.** | **Aðrir fíggjarligir kostnaðir** | | |
| | Aðrir fíggjarligir kostnaðir | 25.802 | 32 |
| | | **25.802** | **32** |
| **3.** | **Áogn** | | |
| | Vøru- og tænastuáogn | 11.000 | 6 |
| | | **11.000** | **6** |
| **4.** | **Flutt úrslit** | | |
| | Flutt úrslit primo | 5.035.745 | 4.418 |
| | Flutt úrslit í árinum | 686.459 | 618 |
| | Rætting flutt úrslit 2021 | -23.889 | 0 |
| | | **5.698.315** | **5.036** |

# Ársroknskapur 2022

| Nr. | RAKSTRARROKNSKAPUR | Tíðarskeiðið | Árið fyri |
|---|---|---|---|
| | **Inntøkur** | | |
| 1040 | Inntøka sambært avtalu MMR | -900.987,80 | -1.063.425,70 |
| 1041 | Inntøka sambært avtalu Kommunar | -1.436.800,00 | -1.396.200,00 |
| 1042 | Inntøka sambært avtalu Kvf | -268.702,61 | -414.097,39 |
| 1043 | Inntøka frá stovnum | 0,00 | -150,00 |
| | **Inntøkur íalt** | **-2.606.490,41** | **-2.873.873,09** |
| | | | |
| | **Umsitingarútreiðslur** | | |
| 2210 | Lønir | 606.902,54 | 519.779,03 |
| 2211 | Frítíðalønir | 13.160,37 | 8.844,01 |
| 2213 | Nevndarsamsýning | 28.379,52 | 19.448,78 |
| 2222 | ArbeiðsMarknaðarEftirlønarGrunnurin | 17.791,00 | 17.018,00 |
| 2223 | Arbeiðsloysisskipanin | 3.677,00 | 5.868,00 |
| 2224 | Barsilsgrunnurin | 5.674,00 | 5.312,00 |
| 2241 | Starvsfólkakostn./útbúgv. vm | 441,41 | 6.152,29 |
| 2750 | Matstovu/umboðan | 9.007,65 | 1.919,30 |
| 2754 | Gávur og blómar | 2.250,00 | 1.512,00 |
| 2770 | Ferðing og umboðan | 65.127,52 | 0,00 |
| 2800 | Kunning, marknaðarføring & rættlestur | 15.839,70 | 7.458,00 |
| 2811 | Tiltøk | 0,00 | 0,00 |
| 3411 | Húsaleiga | 12.960,33 | 12.837,50 |
| 3600 | Skrivstovu útr. pappír vm | 3.305,90 | 2.468,58 |
| 3604 | Edv og skipanir | 16.842,88 | 15.735,90 |
| 3617 | Smærri innkeyp (teldu, printari vm) | 26.336,11 | 0,00 |
| 3620 | Telefon | 3.575,35 | 0,00 |
| 3628 | Bankakostnaðir | 2.085,98 | 3.735,50 |
| 3640 | Grannskoðari | 7.500,00 | 3.232,00 |
| 3645 | Advokatur | 12.500,00 | 7.500,00 |
| 3647 | Bókhald | 25.920,00 | 25.000,00 |
| 3661 | Yrkisbókmentir | 0,00 | 25.680,00 |
| 3663 | Limagjald IFRRO | 6.296,14 | 994,36 |
| 3664 | Web-hotel og domæni | 0,00 | 6.296,14 |
| 3720 | Tap av skuldarum | 0,00 | 18.200,00 |
| 4410 | Rentuútreiðslur, banki | 25.802,10 | 31.749,13 |
| | **Útreiðslur samantalt** | **911.375,50** | **746.740,52** |
| | | | |
| | Rakstrarúrslit | -1.695.114,91 | -2.127.132,57 |
| | | | |
| | Umsitingarpartur í % | 34,97 | 25,98 |

viðmerkingar
Konto 1040: lækkingin stavar frá mótrokning av einum parti av gjaldinum frá Fróðskaparsetrinum árið fyri, tá ið vit høvdu fingið skeiv (ov høg) tøl fyri studentaársverk frá teimum

Konto 2210: í 2022 umfataði hetta løn til umsitara, aðalskrivara, KT-mennara og studentahjálp

Konto 2800: td framleiðsla av tilfari til læraradagar og bókadagar, umframt kunngerðir í útvarpinum við fráboðan um puljur

Konto 3600: td ársuppgerð til rættindahavarar umvegis MínBoks

Konto 3664: tað er ikki týdningarmiki, at skilja ímillum "Web-hotel og domeni" og edv skipanir annars – ein partur av edv skipanunum, sosum spurnakanning, liggur á web-hotellinum. Tískil

| | **Beinleiðis útreiðslur (viðurløg)** | | |
|---|---|---|---|
| 1350 | Útg. nýtslugjøld undir MMR | 213.614,54 | 332.901,51 |
| 1351 | Útg. nýtslugjøld frá Kommununum | 596.191,99 | 854.228,47 |
| 1352 | Útg. nýtslugjøld frá Kringvarp Føroya | 198.849,31 | 345.991,83 |
| | **Beinleiðis útreiðslur samantalt** | **1.008.655,84** | **1.533.121,81** |

# Umsiting 2022

| Viðmerkingar | Umsitingarútreiðslur | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|
| | Starvsfólkaútreiðslur samantaldar | 676.025,84 | 582.422,11 |
| | Ferðing og marknaðarførsla samantalt | 92.224,87 | 10.889,30 |
| | Hølisútreiðslur samantaldar | 12.960,00 | 12.837,50 |
| | Umsitingarútreiðslur samantaldar | 104.362,36 | 108.142,48 |
| | Rentuútreiðslur samantaldar | 25.802,10 | 31.749,13 |
| | **Samantalt** | **911.375,17** | **746.040,52** |
| | | | |
| | **Sett av til umsiting (fast umsitingargjald)** | | |
| *Avtalufest* | 10 % umsiting frá KVF | 26.870,26 | 37.644,88 |
| *Avgjørt á stjórnarfundi* | 20 % av 2014-17 pengum frá MMR tá teir eru fyrnaðir | 0,00 | 26.666,60 |
| | **Samantalt** | **26.870,26** | **64.311,48** |
| | | | |
| | **Eftir í umsitingargjald til kommunurnar og MMR** | 884.504,91 | 681.729,04 |
| | | | |
| | **Innkomi frá avtalum, ið umsiting skal roknast fyri** | | |
| | Uttanríkis- og Mentamálaráðið | 900.987,80 | 1.063.425,70 |
| | Kommunurnar | 1.436.800,00 | 1.396.200,00 |
| | Barnabati | 0,00 | 150,00 |
| | **Samantalt** | **2.337.787,80** | **2.459.775,70** |
| | | | |
| | **Umsitingargjald í prosentum** | **37,84** | **27,72** |
| | | | |
| | Umsitingargjald í krónum frá avtalu | | |
| | Uttanríkis- og Mentamálaráðið | 340.889,85 | 294.729,39 |
| | Kommunurnar | 543.615,06 | 386.958,08 |
| | Barnabati | 0,00 | 41,57 |
| | | | |
| | At gjalda rættindahavum (før. og útl.) eftir avtalu | | |
| | Uttanríkis- og Mentamálaráðið | 560.097,95 | 768.696,31 |
| | Kommunurnar | 893.184,94 | 1.009.241,92 |
| | Barnabati | 0,00 | 108,43 |

# Pengar inn - pengar út

| Pengar inn og pengar út 2022 | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Avtala | Stovnar | KOM | KVF | MMR | Stovnar | KOM | KVF |
| Tíðarskeið | 2022 | 2022 | 2022 | 2022 | 2021 | 2021 | 2021 |
| | | | | | | | |
| **Pengar inn** | | | | | | | |
| Viðurløg | 0,00 | 893.184,94 | 241.832,35 | 560.097,95 | 108,43 | 1.009.241,92 | 376.448,75 |
| Umsitingargjald | 0,00 | 543.615,06 | 26.870,26 | 340.889,85 | 41,57 | 386.958,08 | 37.644,88 |
| Samlað upphædd | 0,00 | 1.436.800,00 | 268.702,61 | 900.987,80 | 125,00 | 1.396.200,00 | 414.093,63 |
| | | | | | | | |
| **Býti av viðurløgum** | | | | | | | |
| **Krøv** | | | | | | | |
| Krav frá rættindahava | | | | | | | |
| | | | | | | | |
| **Føroyskir rættindahavar** | | | | | | | |
| til at býta út frá skráseting | | | 241.832,35 | | | | 376.448,75 |
| at býta út eftir sannlíkum brúki | | | | | | | |
| **Samlað at býta út til føroyskar rættindahavar** | | | 241.832,35 | | | | 376.448,75 |
| | | | | | | | |
| **Utlendskir rættindahavar** | | | | | | | |
| kann ikki býtast út (B-avtala) | | | | | 108,43 | | |
| kann ikki býtast út (land uttan avtalu) | | | | | | | |
| **Samlað kann ikki býtast út** | | | | | 108,43 | | |
| | | | | | | | |
| **Fyrnd** | | | | | | | |
| Fyrnaðir | | | | | | | |
| ikki útgoldnir pengar fyrnast 31.des | 2025 | 2025 | 2025 | 2025 | 2024 | 2024 | 2024 |
| | | | | | | | |
| **Pengar út** | | | | | | | |
| **Eru yvirførdir til rættindahava** | | | | | | | |
| Eftir skráseting | | * | 198.849,31 | * | | * | 240402,73 |
| Eftir sannlíkum brúki | | * | | * | | * | |
| Eftir krav frá rættindahava | | * | | * | | * | |
| | | | | | | | |
| **Standa á konto hjá Fjølrit við navni rættindah.** | | | | | | | |
| Rættindahavi hevur ikki skrásett seg | | | 45.422,18 | | | | 136046,02 |
| Samlað upphædd er undir 300 kr | | | | | | | |
| | | | | | | | |
| * útgjald ikki byrja enn | | | | | | | |

# Pengar inn - pengar út

| Pengar inn og pengar út 2022 | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Avtala | MMR | Stovnar | KOM | KVF | MMR | KOM | KVF |
| Tíðarskeið | 2021 | 2020 | 2020 | 2020 | 2020 | 2019 | 2019 |
| | | | | | | | (3 kvartalir) |
| **Pengar inn** | | | | | | | |
| Viðurløg | 768.696,31 | | 1.011.587,50 | 401.460,42 | 715.605,03 | 1.005.124,74 | 235.356,40 |
| Umsitingargjald | 294.729,39 | | 362.012,50 | 40.207,91 | 256.090,52 | 392.275,26 | 23.536,04 |
| Samlað upphædd | 1.063.425,70 | 325,00 | 1.373.600,00 | 441.668,33 | 971.695,55 | 1.397.400,00 | 258.892,44 |
| | | | | | | | |
| **Býti av viðurløgum** | | | | | | | |
| **Krøv** | | | | | | | |
| Krav frá rættindahava | | | | | | | |
| | | | | | | | |
| **Føroyskir rættindahavar** | | | | | | | |
| til at býta út frá skráseting | | | 123.857,29 | 401.460,42 | 155.049,57 | 109.671,67 | 235.356,40 |
| at býta út eftir sannlíkum brúki | | | 586.740,72 | | 155.049,57 | 829.227,92 | |
| **Samlað at býta út til føroyskar rættindahavar** | | | 710.598,01 | 401.460,42 | 310.099,14 | 938.899,59 | 235.356,40 |
| | | | | | | | |
| **Útlendskir rættindahavar** | | | | | | | |
| kann ikki býtast út (B-avtala) | | 325,00 | 253.785,12 | | 354.897,73 | 61.352,81 | |
| kann ikki býtast út (land uttan avtalu) | | | 47.204,03 | | 42.936,30 | 4.854,75 | |
| **Samlað kann ikki býtast út** | | 325,00 | 300.989,15 | | 397.834,03 | 66.207,56 | |
| | | | | | | | |
| **Fyrnd** | | | | | | | |
| Fyrnaðir | | | | | | | |
| ikki útgoldnir pengar fyrnast 31.des | 2024 | 2023 | 2023 | 2023 | 2023 | 2022 | 2022 |
| | | | | | | | |
| **Pengar út** | | | | | | | |
| **Eru yvirførdir til rættindahava** | | | | | | | |
| Eftir skráseting | * | | 9451,27 | 308.994,14 | 64312,78 | 25000,7 | 130.505,20 |
| Eftir sannlíkum brúki | * | | 586740,72 | | 155049,14 | 829.227,92 | |
| Eftir krav frá rættindahava | * | | | | | | |
| | | | | | | | |
| **Standa á konto hjá Fjølrit við navni rættindah.** | | | | | | | |
| Rættindahavi hevur ikki skrásett seg | | | 72.032,50 | 92.466,28 | 88.463,54 | 84671,59 | 104.851,20 |
| Samlað upphædd er undir 300 kr | | | | 0,00 | 453,09 | | 0,00 |
| | | | | | | | |
| * útgjald ikki byrja enn | | | | | | | |

# Pengar inn - pengar út

| Pengar inn og pengar út 2022 | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Avtala | MMR | KVF | MMR | MMR (gml) | MMR (gml) | MMR (gml) | MMR (gml) |
| Tíðarskeið | 2019 | 2018 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 |
| | | | | | | | |
| **Pengar inn** | | | | | | | |
| Viðurløg | 680.299,44 | 375.000,00 | 446.544,09 | 106.666,40 | 160.000,00 | 160.000,00 | 160.000,00 |
| Umsitingargjald | 265.504,01 | 37.500,00 | 580.312,86 | 26.666,60 | 40.000,00 | 40.000,00 | 40.000,00 |
| Samlað upphædd | 945.803,45 | 412.500,00 | 1.026.856,95 | 133.333,00 | 200.000,00 | 200.000,00 | 200.000,00 |
| | | | | | | | |
| **Býti av viðurløgum** | | | | | | | |
| **Krøv** | | | | | | | |
| Krav frá rættindahava | | | | | | 1.310,04 | |
| | | | | | | | |
| **Føroyskir rættindahavar** | | | | | | | |
| til at býta út frá skráseting | 152.025,12 | 375.000,00 | 102.325,58 | | | | |
| at býta út eftir sannlíkum brúki | 152.025,12 | | 102.325,58 | | | | |
| **Samlað at býta út til føroyskar rættindahavar** | 304.050,24 | 375.000,00 | 204.651,16 | | | | |
| | | | | | | | |
| **Útlendskir rættindahavar** | | | | | | | |
| kann ikki býtast út (B-avtala) | 339.575,31 | | 241.892,84 | | | | |
| kann ikki býtast út (land uttan avtalu) | 36.673,44 | | 21.880,66 | | | | |
| **Samlað kann ikki býtast út** | 376.248,75 | | 263.773,50 | | | | |
| | | | | | | | |
| **Fyrnd** | | | | | | | |
| Fyrnaðir | | 21540 | 330.180,61 | 106.666,40 | 160.000,00 | 158.689,96 | 160.000,00 |
| ikki útgoldnir pengar fyrnast 31.des | 2022 | 2021 | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 |
| | | | | | | | |
| **Pengar út** | | | | | | | |
| **Eru yvirførdir til rættindahava** | | | | | | | |
| Eftir skráseting | 69764,58 | 353.460,00 | 46.511,56 | | | | |
| Eftir sannlíkum brúki | 152025,12 | | 92.799,00 | 106.666,40 | 159.999,96 | 159.999,98 | 159.999,98 |
| Eftir krav frá rættindahava | | | | | | | |
| | | | | | | | |
| **Standa á konto hjá Fjølrit við navni rættindah.** | | | | | | | |
| Rættindahavi hevur ikki skrásett seg | 75012,04 | - | - | | | | |
| Samlað upphædd er undir 300 kr | 237,22 | - | - | | | | |
| | | | | | | | |
| * útgjald ikki byrja enn | | | | | | | |

# Støðudagføring yvir viðurløg

## pr 31.12.2022

| Avtala | Bekt | Viðurløg samantalt | Viðurløg útgoldið | Upphædd < 300 kr hjá skrásettum Rættindahava | Rættindahavi ikki Skrásett seg enn | Viðurlag fyrnað |
|---|---|---|---|---|---|---|
| KOM | 18/19 | 109672,29 | 25000,7 | 0 | 84671,59 | |
| KOM | pulja 18/19 | 829227,78 | 829227,78 | 0 | 0 | |
| KOM | 19/20 | 123857,29 | 9451,27 | 0 | 72032,5 | |
| KOM | pulja 19/20 | 586740,72 | 586740,72 | 0 | 0 | |
| KVF | 2018 | 375000 | 353460 | 0 | - | 21540 |
| KVF | 1.kv 2019 | 73914 | 30581,6 | 0 | 43332,4 | |
| KVF | 2.kv 2019 | 82245,2 | 49276 | 0 | 32969,2 | |
| KVF | 3.kv 2019 | 79197,2 | 50647,6 | 0 | 28549,6 | |
| KVF | 4.kv 2019 | 99201,6 | 82098,94 | 0 | 17102,66 | |
| KVF | 1.kv 2020 | 97247,08 | 82947,68 | 0 | 14299,4 | |
| KVF | 2.kv 2020 | 103278,94 | 64076,16 | 0 | 39202,78 | |
| KVF | 3.kv 2020 | 101732,8 | 79871,36 | 0 | 21861,44 | |
| KVF | 4.kv 2020 | 113023,22 | 70434,2 | 0 | 42589,02 | |
| KVF | 1.kv 2021 | 96897,45 | 47550,1 | 0 | 49347,35 | |
| KVF | 2.kv 2021 | 104035,1 | 66138,8 | 0 | 37896,3 | |
| KVF | 3.kv 2021 | 62492,98 | 56279,63 | 0 | 6213,35 | |
| KVF | 4.kv 2021 | 30861,38 | 20077,88 | 0 | 10783,5 | |
| KVF | 1.kv 2022 | 36553,05 | 29858,67 | 0 | 6694,38 | |
| KVF | 2.kv 2022 | 98814,59 | 80752 | 0 | 18062,59 | |
| KVF | 3.kv 2022 | 78042,47 | 68160,76 | 0 | 9881,71 | |
| MMR | 17/18 | 102542,64 | 46511,56 | - | - | 56880,53 |
| MMR | 18/19 | 144565,94 | 69764,58 | 237,22 | 75012,04 | |
| MMR | fyrnd 14/15 | 319999,95 | 319999,95 | 0 | 0 | |
| MMR | pulja 17/18 | 92799 | 92799 | 0 | 0 | |
| MMR | fyrnd 2016 | 159999,96 | 159999,96 | 0 | 0 | |
| MMR | pulja 18/19 | 152025,12 | 152025,12 | 0 | 0 | |
| MMR | fyrnd 2017 | 106666,2 | 106666,2 | 0 | 0 | |
| MMR | 19/20 | 154371,2 | 64312,78 | 453,09 | 90058,42 | |
| MMR | pulja 19/20 | 155049,14 | 155049,14 | 0 | 0 | |

# Fíggjarætlan 2023

## FÍGGJARÆTLAN 2023

| Nr. | RAKSTRARROKNSKAPUR | Fíggjarætlan 2023 | 2022 | Fíggjarætlan 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Inntøkur** | | | | |
| 1040 | Inntøka sambært avtalu MMR | -1.000.000 | -900.987,80 | -1.000.000 | -1.063.425,70 |
| 1041 | Inntøka sambært avtalu Kommunar | -1.500.000 | -1.436.800,00 | -1.400.000 | -1.396.200,00 |
| 1042 | Inntøka sambært avtalu Kvf | -300.000 | -268.702,61 | -375.000 | -414.097,39 |
| 1043 | Inntøka frá stovnum | -150 | 0,00 | -150 | -150,00 |
| | **Inntøkur íalt** | **-2.800.150** | **-2.606.490,41** | **-2.775.150** | **-2.873.873,09** |
| | | | | | |
| | **Beinleiðis útreiðslur (viðurløg)** | | | | |
| 1350 | Útg. nýtslugjøld undir MMR | 300.000 | 213.614,54 | 600.000 | 332.901,51 |
| 1351 | Útg. nýtslugjøld frá Kommununum | 800.000 | 596.191,99 | 800.000 | 854.228,47 |
| 1352 | Útg. nýtslugjøld frá Kringvarp Føroya | 300.000 | 198.849,31 | 300.000 | 345.991,83 |
| 1353 | Útg. nýtslugjøld frá stovnum | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | **Beinleiðis útreiðslur samantalt** | **1.400.000** | **1.008.655,84** | **1.700.000** | **1.533.121,81** |
| | | | | | |
| | **Umsitingarútreiðslur** | | | | |
| 2210 | Lønir | 660.000 | 606.902,54 | 550.000 | 519.779,03 |
| 2211 | Frítíðalønir | 14.000 | 13.160,37 | 9.000 | 8.844,01 |
| 2213 | Nevndarsamsýning | 25.000 | 28.379,52 | 25.000 | 19.448,78 |
| 2222 | ArbeiðsMarknaðarEftirlønarGrunnurin | 25.000 | 17.791,00 | 20.000 | 17.018,00 |
| 2223 | Arbeiðsloysisskipanin | 8.000 | 3.677,00 | 6.500 | 5.868,00 |
| 2224 | Barsilsgrunnurin | 8.000 | 5.674,00 | 6.000 | 5.312,00 |
| 2230 | KM-peningur | 0 | 0,00 | 0 | 0,00 |
| 2241 | Starvsfólkakostn./útbúgv. vm | 0 | 441,41 | 10.000 | 6.152,29 |
| 2750 | Matstovu/umboðan | 10.000 | 9.007,65 | 13.000 | 1.919,30 |
| 2754 | Gávur og blómar | 1.000 | 2.250,00 | 1.000 | 1.512,00 |
| 2770 | Ferðing og umboðan | 50.000 | 65.127,52 | 50.000 | 0,00 |
| 2800 | Kunning, marknaðarføring & rættlestur | 10.000 | 15.839,70 | 10.000 | 7.458,00 |
| 2811 | Tiltøk | 5.000 | 0,00 | 10.000 | 0,00 |
| 3411 | Húsaleiga | 13.000 | 12.960,33 | 13.000 | 12.837,50 |
| 3600 | Skrivstovu útr. pappír vm | 2.000 | 3.305,90 | 2.000 | 2.468,58 |
| 3604 | Edv og skipanir | 18.000 | 16.842,88 | 18.000 | 15.735,90 |
| 3617 | Smærri innkeyp (teldu, printari vm) | 10.000 | 26.336,11 | 5.000 | 0,00 |
| 3620 | Telefon | 4.000 | 3.575,35 | 4.000 | 3.735,50 |
| 3628 | Bankakostnaðir | 3.000 | 2.085,98 | 3.000 | 2.532,00 |
| 3640 | Grannskoðari | 8.000 | 7.500,00 | 8.000 | 7.500,00 |
| 3645 | Advokatur | 40.000 | 12.500,00 | 40.000 | 25.000,00 |
| 3647 | Bókhald | 30.000 | 25.920,00 | 30.000 | 25.680,00 |
| 3661 | Yrkisbókmentir | 0 | 0,00 | 2.000 | 994,36 |
| 3663 | Limagjald IFRRO | 6.500 | 6.296,14 | 6.500 | 6.296,14 |
| 3664 | Web-hotel og domæni | 0 | 0,00 | 0 | 0,00 |
| 3720 | Tap av skuldarum | 0 | 0,00 | 0 | 18.200,00 |
| 4410 | Rentuútreiðslur, banki | 25.000 | 25.802,10 | 23.000 | 31.749,13 |
| | **Útreiðslur samantalt** | 975.500 | **911.375,50** | 865.000 | **746.040,52** |
| | | | | | |
| | Rakstrarúrslit | | -1.695.114,91 | | -2.127.832,57 |
| | | | | | |
| | Umsitingarpartur í % | 34,84 | 34,97 | 31,17 | 25,96 |

# Val 2022

Av sitandi stjórn, stillaðu Helle Thede Johansen, Høgni Reistrup og Niels Jákup Thomsen uppaftur og vórðu afturvald. Sum varalimir vórðu valdir Steintór Rasmussen og Beinir Bergsson. Ole Wich stillaði uppaftur sum formaður í umboðsráðnum, og Kim Simonsen stillaði uppaftur sum næstformaður. Báðir vórðu afturvaldir

## Stjórnin

**Helle Thede Johansen**
forfólk

**Høgni Reistrup**
næstforfólk

**Niels Jákup Thomsen**
skrivari

**Steintór Rasmussen**
varalimur

**Beinir Bergsson**
varalimur

## Umboðsráðið

**Ole Wich**
formaður

**Kim Simonsen**
næstformaður

**Jørgen Lützen**
umboðsráðslimur

**Kristian Blak**
umboðsráðslimur

**Jón Brian Hvidtfeldt**
umboðsráðslimur

**Jonhard Mikkelsen**
umboðsráðslimur

## Limafeløg

**Føroysk myndlistafólk**

**Rithøvundafelag Føroya**

**Føroyskir yrkisfotografar**

**Føroysk tónaskøld**

**Føroysk miðlafólk**

**Føroysk bókaforløg**

## Grannskoðari

**Január**
Løggilt grannskoðanarvirki

FJØLRIT

- tryggjar burðardyggu listaringrásina

**Fjølrit** • postsmoga 62 • FO-110 Tórshavn
www.fjoelrit.fo • tel + 298 238600 og 238601
post@fjoelrit.fo • v-tal 429198

**Útgevari:** Fjølrit
**Myndir:** Fjølrit og Helle Thede Johansen
**Sniðgivið og sett upp:** Heidi Durhuus, Arnbjørn Ólavsson
Dalsgarð og Helle Thede Johansen
**Útgávuár:** 2023

Endurnýtsla úr blaðnum er bert loyvt við skrivligum loyvi